Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

– DESEMBUR 2022

# Fíggjarligt støðufesti

## 3. ársfjórðing 2022

Í oktobur 2022 var útlánsvøksturin 2,9% hjá føroysku bankunum og 2,7% tá ið danskir fíggjarstovnar verða taldir uppí. Flestu húsarhaldini hava broytiliga rentu og verða tí rakt av rentuhækkingum.

### *Vøksturin í útlánum*

Útlánini hjá føroysku bankunum eru í tíðarskeiðinum oktobur 2021 til oktobur 2022 økt við umleið 530 mió. kr. Útlánini vóru nærum 17,1 mia. kr. tilsamans í oktobur 2022 til føroyskar kundar. Útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum, roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal[1], var 2,9% í oktobur 2022 í mun til árið fyri. Tað er partvíst útlán til kommunurnar og privatu vinnuna, sum eru orsøk til útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum í oktobur 2022.

*Mynd 1. Útlánsvøkstur*




*Kelda: Landsbanki Føroya. Viðm.: Ársvøkstur í útlánum frá føroyskum og donskum peninga- og realkredittstovnum til føroyskar kundar, 3 mðr. glíðandi miðal. Millumbanka útlán eru ikki íroknaði.*

Útlánini til kommunurnar eru økt við 106 mió. kr. í oktobur 2022 í mun til oktobur í fjør og skuldin hjá kommununum var tilsamans 1,4 mia. kr. í føroysku bankunum í oktobur 2022.

Føroysku bankarnir hava samstundis veitt privatu vinnuni fígging fyri 265 mió. kr. meira í oktobur 2022 samanborið við oktobur í fjør. Fiski- og alivinnan hevur økt lántøkuna úr 895 mió. kr. í oktobur 2021 til 1.022 mió. kr. í oktobur 2022; ein vøkstur á 127 mió. kr. Útlán til byggivinna eru økt við 96 mió. kr. og við 94 mió. kr. til fyritøkur innan elveiting.

[1] Útlánini kunnu sveiggja frá mánað til mánað og útlánsvøksturin verður tí roknaður sum eitt miðaltal yvir 3 mánaðar. Útlánsvøksturin í oktobur 2022 er sostatt roknaður sum miðalið av útlánunum í aug-sep-okt í mun til miðalið av útlánunum í sama tíðarskeiði árið fyri.

Útlánini til tænastuvinnuna eru lægri í oktobur 2022, enn tey vóru í oktobur í fjør; millum annað eru útlán til gisti- og matstovuvinnuna fallin við 184 mió. kr. í hesum tíðarskeiði.

Meðan privata vinnan hevur økt um lántøkuna í hesum tíðarskeiði, hava almennu fyritøkurnar minkað um sína skuld við 155 mió. kr. Eisini hava tryggingar- og penjsónsfeløg minkað um lántøkuna við 92 mió. kr.

Føroysku húsarhaldini hava tikið lán í føroysku bankunum fyri umleið 410 mió. kr. í tíðarskeiðinum oktobur 2021 til oktobur 2022. Saman við øktu útlánunum til vinnuna sum heild (privata og almenna vinnan tilsamans) á netto 111 mió. kr. og øktu útlánunum til tað almenna á netto 101 mió. kr., eru útlánini frá føroysku bankunum økt við tilsamans 530 mió. kr. í oktobur 2022 í mun til oktobur í fjør.

Skuldin hjá føroysku húsarhaldunum í donskum realkredittstovnum var 3.991 mió. kr. í oktobur 2022 í mun til 3.697 mió. kr. í oktober í fjør. Lántøkan í donsku realkredittstovnum er sostatt økt hetta seinasta árið, men vøksturin í útlánum hjá realkredittstovnum til føroyskar kundar var ikki eins høgur sum hann hevur verið seinastu áleið 3 árini. Útlánsvøksturin hjá donsku realkredittstovnunum til føroyskar kundar var 9% í oktobur 2022 roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal.

Vøksturin í útlánunum frá føroysku og donsku peninga- og realkredittstovnunum tilsamans var 2,7% í oktobur 2022 roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal. Hjá føroysku bankunum eina, var hann 2,9% í oktobur 2022. Útlánsvøksturin er sostatt lægri enn í sama tíðarskeiði í fjør; í oktobur 2021 var útlánsvøksturin 5,0% hjá føroysku bankunum, meðan hann var 8,1% í oktobur 2021 tá donsku peninga- og realkredittstovnarnir verða taldir uppí.

***Innlánsyvirskotið veksur***

Innlánini í føroysku bankunum vóru nærum 19 mia. kr. í oktobur 2022, og húsarhaldini[2] áttu 12,6 mia. kr. av hesum. Innlánini í føroysku bankunum frá føroyskum kundum eru økt við 923 mió. kr. ella við 5,1% í tíðarskeiðinum oktobur 2021 til oktobur 2022.

Innlánsyvirskotið, sum eru innlán frároknað útlán í føroysku bankunum íroknað útlendskar deildir, var 1,98 mia. kr. í oktobur 2022. Í oktobur 2021 var innlánsyvirskotið 1,28 mia. kr., og innlánsyvirskotið er tí økt við 700 mió. kr. síðani oktobur í fjør. Innlánsyvirskotið er væl lægri, enn áðrenn februar 2021, tá ið danska deildin hjá BankNordik varð seld. Grønlendska deildin hjá BankNordik er íroknað tølini, og hon hevur innlánsundirskot. Innlánsundirskotið hjá grønlendsku deildini hjá BankNordik er økt við 104 mió. kr. í tíðarskeiðinum oktobur 2021 til oktobur 2022.

Vinnan sum heild hevur framvegis innlánsundirskot í føroysku bankunum, men tað er minkað. Privata vinnan hevur økt um innlánini hetta seinasta árið, og serliga er tað fiski- og alivinnan, sum hevur sett meira inn á konto í føroysku bankunum síðani á vári 2022. Almennu fyritøkurnar hava eitt lítið innlánsyvirskot, meðan privatu fyritøkurnar hava eitt innlánsundirskot á 1,3 mia. kr. í oktobur 2022. Privata vinnan hevur sett 680 mió. kr. meira á konto í føroysku bankunum í tíðarskeiðinum oktobur 2021 til oktobur 2022, og innlánsundirskotið er tí minkað við hesi upphædd.

Kommunurnar hava innlánsundirskot, tað er vaksið við 119 mió. kr. síðani oktobur 2021. Innlánsundirskotið hjá kommununum í føroysku bankunum var 1,17 mia. kr. í oktobur 2022.

[2] Húsarhald íroknað NPISH. Húsarhald eru løntakarar og pensjónistar vm. og sjálvstøðugt vinnurekandi. NPISH merkir non-profit felagsskapir so sum ítróttarfeløg og líknandi.

*Mynd 2. Innlánsyvirskot*




*Kelda: Landsbanki Føroya. Viðm.: Innlánsyvirskot hjá føroyskum peningastovnum íroknað útlendskar deildir hjá BankNordik. Millumbanka inn- og útlán til aðrar fíggjarstovnar eru ikki íroknaði.*

Húsarhaldini hava hinvegin stórt innlánsyvirskot í føroysku bankunum, tað var 3,3 mia. kr. í oktobur 2022. Húsarhaldini hava tó minkað um síni innlán síðani á vári 2022. Innlánsyvirskotið hjá húsarhaldunum var umleið 150 mió. kr. lægri í oktobur 2022 samanborið við oktobur 2021. Húsarhaldini læna eisini frá donskum realkredittstovnum, og tá ið hendan skuldin verður drigin frá, høvdu húsarhaldini eitt innlánsundirskot á 516 mió. kr. í føroysku og donsku peninga- og realkredittstovnunum tilsamans í oktober 2022.

# Ogn og skuld hjá húskjum

### *Samlað ogn minus skuld*

Landsbanki Føroya hevur dagført uppgerðina av ogn og skuld hjá føroyskum húskjum[i] til árið 2020. Landsbankin nýtir uppgerðina til at lýsa, hvussu skuldarbundin føroysk húskir eru í mun til sína inntøku, og hvussu stór samlaða ognin og skuldin hjá føroyingum er samanborið við onnur lond.

Samlaða nettoognin er økt frá at vera 5,2 ferðir tøku inntøkuna í 2019[3] til at vera 5,4 ferðir tøku inntøkuna í 2020. Broytingin stavar frá, at ognirnar hjá føroysku húskjunum eru øktar í virði; tað vil siga, at millum annað sethúsaognin, privata eftirlønaruppsparingin og innlánini í føroysku peningastovnunum vóru størri í 2020 í mun til árið fyri.

Skuldin hjá føroysku húskjunum er eisini økt; hon var størri í donsku realkredittstovnunum og minni í føroysku bankunum í 2020 í mun til árið fyri, men samlaða skuldin hjá føroysku húskjunum er ikki økt líka nógv, sum samlaðu ognirnar í 2020, og tí sæst ein vøkstur í nettoognini í 2020 í mun til árið fyri.

Av fíggjarligum ognum áttu føroysk húskir fyri 28 mia. kr. tilsamans í 2020. Um 11,3 mia. kr. stóðu sum innlán í føroysku bankunum og 5,1 mia. kr. sum innlán ella á depotkonti í útlendskum peningastovnum í 2020. Burturav hesum høvdu føroysk húsarhald innlán fyri 179 mió. kr. í donskum peningastovnum við ársenda 2020[ii]. Privata eftirlønaruppsparing hjá føroyingum var 11,6 mia. kr. tilsamans í 2020[iii], og tað svarar til 55% av BTÚ í 2020 tá ið hædd verður tikið fyri, at ein partur av eftirlønaruppsparingunum skal skattast við útgjald.[4]

Afturat fíggjarligu ognunum áttu føroyingar realar ognir, sum eru sethús, bilar og bátar, fyri eitt samlað virði á 32,3 mia. kr. tilsamans í 2020[iv].

Føroysk húskir høvdu skuld fyri tilsamans 12,6 mia. kr. í 2020[v]. Um 9,2 mia. kr. vóru lán í føroyskum peningastovnum, meðan skuldin var 3,2 mia. kr. í donsku realkredittstovnunum. Harafturat høvdu summi húsarhald lænt frá útlendskum lánveitarum til keyp av bili umvegis føroyskar bilasølur.

[3] Sí frágreiðing Landsbankans um fíggjarligt støðufesti 3. ársfjórðing 2021 og frágreiðingina Ogn og skuld hjá føroyskum húskjum frá desember 2020 á heimasíðu Landsbanka Føroya.

[4] Uppgjørt er eftir leisti hjá Danmarks Statistik (familiefordelt nettoformue), ið merkir, at tænastumanna-pensjónir eru íroknaðar og hædd er tikið fyri framtíðar skatting (óskattaðar privatar pensjónsuppsparingar innganga bert við 60%).

Eisini ber til at lána frá útlendskum lánveitarum gjøgnum summar føroyskar handlar; eitt nú handlar, sum selja húsbúnað, men hesar upphæddir metir Landsbankin vera lutfalsliga smáar. Meginparturin av skuldini hjá føroyskum húskjum er sethúsalán, og síðani er ein minni partur lán til bil og ymiskt annað.

Verður samlaða skuldin trekt frá samlaðu ognini, áttu føroysk húskir í 2020 eina nettoogn á umleið 47,8 mia. kr. Tað svarar til 2,25 ferðir BTÚ í 2020. Sæð í mun til tøku inntøkuna, var samlaða nettoognin 5,4 ferðir so stór sum tøka inntøkan hjá føroysku húskjunum í 2020. Til samanbering var nettoognin hjá dønum í 2020 5,6 ferðir so stór sum tøka inntøkan, og hjá íslendingum 6,2 ferðir tøku inntøkuna[vi].

### *Eftirløn og skuld í mun til onnur lond*

Í mynd 3 niðanfyri er privata eftirlønar-uppsparingin, sum húsarhaldini eiga, víst saman við húsarhaldsskuldini fyri Føroyar saman við flestu av OECD londunum[vii]. Bæði tvey eru roknaði í % av BTÚ. Myndin vísir ein positivan samanhang millum støðd av skuld og privata eftirlønaruppsparing, ið merkir, at lond, ið hava stóra pensjónsuppsparing vanliga eisini hava stóra húsarhaldsskuld. Danmark hevur hægstu eftirlønaruppsparingina av vístu londunum í myndini; hon var meira enn tvær ferðir støddina av BTÚ í 2020 (230%), men donsku húskini hava samstundis eina stóra skuld; hon var 113% av BTÚ í 2020. Føroysku húsarhaldini høvdu til samanbering eina skuld á 59% av BTÚ, meðan privata eftirlønaruppsparingin var 49% av BTÚ í 2020[5].

Í miðal var privata eftirlønaruppsparing hjá vístu londunum í myndini 76% av BTÚ í 2020, meðan miðalið fyri húsarhaldsskuld var 70% av BTÚ í 2020 hjá vístu londunum.

*Mynd 3. Eftirlønaruppsparing og skuld, % av BTÚ, 2020*




*Kelda: OECD, 2020.*

[5] Í mynd 3 er uppgjørt í samsvar við uppgerð hjá OECD, tað vil siga, at tænastumannapensjónir ikki eru íroknaðar og hædd er ikki tikið fyri forskatting av pensjónum.

### *Skuldarlutføll hjá føroyskum húskjum*

Mynd 4 vísir, hvussu nógv húskir í Føroyum hava skuldarlutfall omanfyri 3. Skuldarlutfall merkir støðd av skuld mátað í mun til árligu bruttoinntøkuna hjá húskinum. Føroysku bankarnir viðmæla vanliga húsarhaldum ikki at skylda meira enn enn 3,5 ferðir sína árligu inntøku. Meginparturin av skuldini hjá húsarhaldunum er sethúsalán. Burturav teimum tilsamans umleið 18.661 húskjunum í 2021, høvdu 1.415 húskir eitt skuldarlutfall omanfyri 3.

Av hesum høvdu 708 húskir eitt skuldarlutfall millum 3 og 4, 281 húskir høvdu eitt skuldarlutfall millum 4 og 5, meðan 426 húskir høvdu eitt skuldarlutfall omanfyri 5 í 2021.

*Mynd 4. Skuldarlutføll hjá føroyskum húskjum*




*Kelda: Landsbanki Føroya. Viðm.: myndin vísir lutfallið millum skuld og bruttoinntøku hjá føroyskum húskjum uttan mun til støðd av skuld.*

Sostatt høvdu 7,6% av føroysku húskjunum tilsamans í 2021 eitt skuldarlutfall omanfyri 3. Verður einans hugt eftir húskjum, sum hava skuld omanfyri eina ávísa støðd, er talið av teimum við skuldarlutfalli omanfyri 3, lægri.

Verða til dømis 2 mió. kr. í skuld nýttar sum mark, vóru tað 684 húskir í 2021 (3,7% av føroysku húskjunum tilsamans) við skuldarlutfalli omanfyri 3. Í 2020 var sama talið 600 húskir og hyggja vit longur aftur; til dømis til 2014, tá tað var lægst í tíðarskeiðinum 2010-2021, vóru tað 276 húskir, sum høvdu eina skuld omanfyri 2 mió. kr. og eitt skuldarlutfall hægri enn 3.

Talið av húskjum, sum skylda omanfyri 2 mió. kr. og hava eitt skuldarlutfall omanfyri 3, eru fleiri í Suðurstreymoy samanborið við húskir, sum búgva aðrastaðni í landinum. Hetta hongur saman við, at sethúsaprísirnir eru hægri í miðstaðarøkinum. Í Suðurstreymoy vóru húskini 551 í tali við skuldarlutfalli omanfyri 3 í 2021, ið svarar til 75% av teimum húskjunum, sum skylda meira enn 2 mió. kr. og hava skuldarlutfalli hægri enn 3.

### *Føroyska EGS-skuldin mett til 30% í 2022*

Í 2021 er føroyska EGS-skuldin mett til at vera 34% av BTÚ, sí mynd 5. EGS-skuldin er mett at gerast 30% av BTÚ í 2022, og tað kemur serliga av stóra vøkstrinum í BTÚ í 2022, men landskassin hevur eisini goldið 200 mió. kr. niður av skuldini í 2022[6].

EGS stendur fyri Evropeiska Gjaldoyra Samstarvið, og EGS skuld er ein háttur at rokna almenna bruttoskuld, ið ger tað møguligt at samanbera skuldarstøði tvørturum lond. Á donskum verður tað rópt ØMU (Økonomisk Monetær Union) og á enskum EMU (Economic and Monetary Union).

Skuldin hjá almennum fyritøkum, sum tað almenna veðheldur fyri, verður eisini roknað við, um so er, at felagið ikki er sjálvberandi og almenni myndugleikin má gjalda vegna veðhaldið. Harumframt umfatar almenna skuldin, skuldina hjá stjórnarmyndugleikanum, lands-partamyndugleikum (regiónum), kommunum og sosialum grunnum.

[6] Í uppgerðini av føroysku EGS-skuldini er ein lítil óvissa í kommunuskuldini. Orsøkin er, at tað ikki ber til at sundurskilja stuttfreistaða lánsskuld (sum skal teljast við í EGS-skuldina) og stuttfreistaða kreditorskuld (sum ikki skal teljast við). Óvissan er tó í mesta lagi 1% av BTÚ.

*Mynd 5. Almenn bruttoskuld 2021*




*Kelda: Landsbanki Føroya (Føroyar), tradingeconomics.com (Ísland og Noreg) og Eurostat. Viðm.: Almenn bruttoskuld í ymsum londum 2021, EGS-skuld, almenn fyrisiting og tænastur (almennar fyritøkur ikki íroknaðar).*

Megnar ein almenn fyritøka, sum hevur skuld, ikki at afturgjalda skuldina við egnum inntøkum, verður skuldin, ella partur av skuldini, roknað við í almennu EGS-skuldina. Tískil er skuldin hjá P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlinum roknað við í almennu skuldini hjá Føroyum.

Upprunaliga var hesin háttur nýttur til at vita, um evrulondini hildu seg innanfyri avtalaða hámarkið á 60% av BTÚ. Síðani fóru onnur evropeisk lond at nýta leistin at gera upp skuld, so tey kundu samanbera seg við hini evrulondini. Nú verður EGS-leisturin ofta nýttur sum eitt lyklatal, tá samanberingar verða gjørdar um almenna skuld í ymsum londum, eisini hjá londum sum ikki eru ein partur av ES.

# Sethúsamarknaðurin

Mynd 6 vísir støðd av skuld hjá føroyskum privatkundum í ávikavist føroyskum bankum og donskum realkredittstovnum.

*Mynd 6. Skuld hjá føroyskum kundum 2000 – 2021*




*Viðm.: Húsarhald (einstaklingar). Kelda: Landsbanki Føroya.*

Í ár 2000 var samlaða skuldin frá føroyskum bankum nærum 4,8 mia. kr. og í 2021 var henda upphæddin umleið 9,2 mia. kr.

Lánsveitingin úr føroysku bankunum er sostatt nærum tvífaldað seinastu 20 árini.

Donsk realkredittlán hava verið bjóðað føroyskum húsarhaldum síðani 2006. Í 2006 var skuldin hjá føroyingum í donskum realkredittstovnum áleið 150 mió. kr. tilsamans. Við ársenda 2021 var støddin á realkredittlánunum 3,6 mia. kr., sum síðani er vaksin enn meir og er áleið 4 mia. kr. í oktobur 2022.

Samanumtikið er húsarhaldsskuldin í føroysku bankunum og donskum realkredittstovnunum tilsamans meir enn tvífaldað hetta tíðarskeiðið.

*Mynd 7. Tal av realkredittlánum*




*Viðm.: Húsarhald (einstaklingar). Kelda: Landsbanki Føroya.*

Mynd 7 vísir tal av realkredittlánum býtt eftir støddav láni. Í 2006 áttu føroyskir kundar tilsamans 169 realkredittlán og hetta talið er hækkað til 2.680 í 2021.

Í 2021 vóru 1.044 realkredittlán undir 1 mió. kr., meðan 1.087 realkredittlán høvdu eina stødd millum 1 og 2 mió. kr. Skuld í realkredittstovnum millum 2 og 3 mió. kr. vóru 463 tilsamans í 2021 og harafturat vóru 86 realkredittlán á eini stødd hægri enn 3 mió. kr.

Til samanbering vóru tað í 2011 einans 5 realkredittlán, sum vóru omanfyri 3 mió. kr. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at bústaðarprísirnir í Føroyum eru øktir nógv seinastu árini.

### *Sethúsaprísirnir lækkaðir nakað*

Mynd 8 vísir miðalprísin á bústøðum í tíðarskeiðinum 2000 – 2022Q3. Tað sæst, at prísurin er farin upp um alt landið seinastu árini.

Serstakliga í Tórshavn er prísurin á sethúsum farin nógv upp, og liggur miðalprísurin í Tórshavn omanfyri 3,5 mió. kr. Hesin prísvøkstur stavar fyrst og fremst frá stórum eftirspurningi í mun til útboðið, ið millum annað kemur av stóra fólkavøkstrinum í Føroyum seinastu árini.

Harumframt hevur búskaparvøksturin og lága rentustøðið tey seinastu árini eisini sín leiklut. Ein partur stavar allarhelst eisini frá, at bygningskunngerðin frá 2017 (BK17) er sett í gildi, ið millum annað setur krøv til bjálving. Hetta dýrkar um byggiprísin á nýggjum húsum, og tískil eisini um tí alternativa íløguna, sum er at keypa eini eldri hús.

Sethúsaprísirnir lækkaðu í øðrum og triðja ársfjórðingi í 2022, men miðalprísurin higartil fyri 2022 er ikki lægri, enn miðalprísurin var í 2021. Tó siga húsameklarar frá, at tað nú tekur longri tíð at selja húsini. Ein lækking í sethúsaprísunum kann hava við sær, at húsarhaldini gerast meira varin.

*Mynd 8. Bústaðarprísir 2000-2022Q3*




*Viðm.: Árligt miðaltal, 2022 tó bert fram til og við triðja ársfjórðing. Kelda: BankNordik.*

### *Flestu verða rakt av rentuhækkingunum*

Í seinnu helvt av 2022 hava føroysku bankarnir hækkað bæði innláns- og útlánsrenturnar. Útlánsrenturnar[7] eru í miðal hjá føroysku bankunum øktar frá 2,9% í august til 3,23% í oktober 2022. Sannlíkt hækka tær meira í komandi tíðum. Økt útlánsrenta merkir øktar rentuútreiðslur til bæði sethúsalán, billán og onnur nýtslulán. Hækkar rentan við 1 prosentstigi, veksa mánaðarligu rentuútreiðslurnar við umleið 800 kr. um mánaðin fyri hvørja millión krónur, ið ein skyldar.

Tó merkir hetta ikki neyðturviliga, at mánaðarliga lánsgjaldið hjá tí einstaka hækkar so mikið sum 800 kr. fyri hvørja millión, ið ein skyldar og fyri hvørt prosentstig rentan er hækkað, tí hædd skal takast fyri millum annað rentustuðuli og longd av afturgjaldstíð. Ymiskt er, hvussu hart føroysku húsarhaldini verða rakt av rentuhækkingunum, men tess størri skuldin er, tess meira vaksa rentuútreiðslurnar og í tess størri mun verður tiltøkupeningurin skerdur.

Tey, sum verða rakt av rentuhækkingunum, eru tey, sum hava lán við broytiligari rentu. Nærum 87% av lánunum hjá føroysku húskjunum hava broytiliga rentu og 95% av lánunum eru við avdráttum (okt. 2022), sí mynd 9. Lánini í føroysku bankunum hava øll broytiliga rentu, og hesi verða tí beinleiðis rakt av rentuhækkingunum.

Realkredittlánini hava ymisk rentubindingartíðarskeið. Tað merkir, at realkredittlán við broytiligari rentu hava rentu, ið liggur føst í ½ til 5 ár, og húskir við slíkum realkredittlánum verða ikki øll rakt beinanvegin av rentuhækkingum. Tey, ið hava realkredittlán við fastari rentu, hava rentubindingartíðarskeið omanfyri 10 ár.

*Mynd 9. Skuld við og uttan fasta rentu og avdráttum*




*Kelda: Landsbanki Føroya. Viðm.: Føst renta er renta við rentubindingartíðarskeiði omanfyri 10 ár.*

[7] Árlig renta roknað sum 3 mánaðar miðaltal vektað eftir støðd av banka, kelda: Landsbanki Føroya.

Landsbanki Føroya *er ein óheftur almennur stovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti, tað vil siga einum tryggum fíggjarkervi og einum høgum kredittvirði í Føroyum.*

# Notur

[i] Í uppgerðini av ogn og skuld verður hagfrøðiliga hugtakið húskir og ikki húsarhald nýtt. Húskir eru persónar, sum pr. 31. desember í árinum hava sama skrásettan bústað í landsfólkaskránni. Fólk á stovni ella á felagsbýli eru ikki tald við í samlaða talinum av húskjum. Minst ein persónur í húskinum skal hava havt skattskyldu alt árið. Vaksnir persónar eru 18 ár ella eldri. Hugtakið húsarhald verður hinvegin nýtt í tjóðarroknskapinum og er skilmarkað sum løntakarar, pensjónistar, sjálvstøðugt vinnurekandi og NPISH (non-profit felagsskapir so sum ítróttarfeløg, samkomur og líknandi). Tó finnast tøl fyri innlán í donskum peningastovnum bert fyri húsarhald (MFI-hagtøl) og tá verða húsarhald uttan NPISH nýtt. Tøk inntøka hjá føroysku húskjunum fyri árið 2020 er ein fyribils uppgerð (kelda: Landsbanki Føroya). Lutfallið ogn, skuld og nettoogn í mun til tøku inntøkuna, kann tí broytast tá tøka inntøkan er endaliga uppgjørd. Uppgerðin av ogn og skuld er gjørd eftir leisti hjá Danmarks Statistik (sum Familiefordelt nettoformue).

[ii] Keldur: Landsbanki Føroya, TAKS, Hagstova Føroya, og Føroya Gjaldstova, ultimo 2020. Fíggjarligar ognir eru innlán og virðisbrøv í føroyskum og útlendskum peningastovnum (innlán og depotkonti), eftirlønaruppsparing í føroyskum eftirlønarfelagi ella eftirlønaruppsparing, ið verður umsitin av føroyskum peningastovni, umframt tænastumannapensjónir. AMEG er ikki talt við, tí tað ikki er ein persónlig uppsparing. Umleið 90 prosent av samlaðu eftirlønaruppsparingini hjá føroyskum húskjum stendur í føroyskum eftirlønarfeløgum ella verður umsitin umvegis ein føroyskan peningastovn, meðan 10 prosent stendur í donskum eftirlønarfeløgum. Upplýsingar um eftirlønaruppsparingar hjá føroyingum í donskum eftirlønarfeløgum, eru frá Hagstovu Føroya, uppgjørd ultimo 2019 (Gjaldsjavnin).

Ognarviðurskifti viðvíkjandi óskrásettum virðisbrøvum finnast enn ikki fyri einstaklingar, og vera tískil ikki tald við í uppgerðini av ogn og skuld hjá húskjum. Skrásett virðisbrøv sum føroyskir peningastovnar umsita, eru tald við. Landsbanki Føroya hevur upplýsingar frá TAKS um innlán og depotkonti hjá føroyingum, herundir skrásett virðisbrøv í peningastovnum í OECD londum. Skrásett virðisbrøv hjá føroyingum kunnu tó vera umsitin av útlendskum peningastovnum í summum OECD londum, sum ikki hava latið upplýsingar hesum viðvíkjandi. Føroyingar kunnu eisini eiga innlán og depotkonti í øðrum londum, ið ikki eru OECD lond, ið tískil ikki eru tald við her. Virðisbrøv skrásett í eini útlendskari virðisbrævaskrásetingarstovu, eru ikki við. Samlaða ognin hjá føroyingum kann tískil vera undirmett.

[iii] Uppgerðin av ogn og skuld er gjørd eftir leisti hjá Danmarks Statistik (Familiefordelt nettoformue), og í hesi uppgerð eru tænastumannapensjónirnar íroknaðar føroysku eftirlønaruppsparingunum. Harafturat verður hædd tikið fyri skatting av pensjónunum. Tað merkir, at føroysku eftirlønaruppsparingarnar, sum ikki eru forskattaðar, innganga við 60%. Eftirlønaruppsparingin hjá dønum inngongur somuleiðis í donsku uppgerðini við 60% tí hon verður skattað við 40% við útgjald. Íslendska pensjónsuppsparingin inngongur við 70%, tí hon verður skattað við 30% við útgjald. Tøl fyri privata eftirlønaruppsparing eru trupul at samanbera tvørturum lond, tí tey kunnu vera ymiskt uppgjørd. Danir telja til dømis tað, sum verður rópt ATP við í donsku uppgerðini, ið kann samanberast við føroyska AMEG. Uppsparingin í AMEG verður ikki tald við í samlaðu eftirlønaruppsparingina hjá føroyskum húskjum, tí AMEG ikki er ein persónlig uppsparing. Í danska ATP fáa tey, sum hava goldið inn, sína egna uppsparing útgoldið. Í AMEG eigur eingin persónur eina ávísa upphædd, og tí verður eginognin hjá AMEG ikki tald við sum ein persónlig eftirlønaruppsparing hjá føroysku húskjunum.

[iv] Keldur: Føroysku peningastovnarnir, Trygd, Betri Trygging, teyggjan.fo, Akstova Føroya og egnar útrokningar, ultimo 2020. Samlaða virðið á sethúsum hjá føroyskum húskjum er roknað í einum myndli hjá føroysku peningastovnunum. Samlaða virðið á bilum hjá føroyskum húskjum er mett út frá fakturavirðinum á øllum akførum hjá privatpersónum. Mett verður, at fakturavirðið svarar til 40% av søluvirðinum. Virðið á bilunum er avskrivað við 20% árliga eftir aldri á bilunum. Samlaða virðið á bátum hjá føroyskum húskjum er mett út frá hvussu nógv smábátar hjá privatfólki eru tryggjaðir fyri hjá føroysku tryggingarfeløgunum. Umleið 60% av samlaða talinum av skrásettum smábátum eru tryggjaðir, virðið á restini av smábátunum er mett. Tøl fyri virðir á sethúsum, bilum og bátum eru heft við óvissu.

[v] Kelda: Landsbanki Føroya, TAKS og føroyskar bilasølur. Ultimo 2020. Skuld er bruttoskuld í føroyskum og donskum peninga- og realkredittstovnum, umframt øðrum føroyskum almennum fíggjarstovnum, har føroyingar, búsitandi í Føroyum, kunnu hava skuld, eitt nú Búnaðargrunnurin, Húsalánsgrunnurin og føroysk lestrarlán. Skuld í øðrum útlendskum fíggjarstovnum, enn donskum, eru ikki tald við. Lán í øðrum útlendskum fíggjarstovnum, enn donskum peninga- ella realkreditt-stovnum (td. útlendsk lestrarlán) eru ikki tald við. Útlendsk billán tikin umvegis eina føroyska bilasølu eru tald við.

[vi] Donsk tøl eru frá Familiefordelt nettoformue og Disponibel indkomst, Danmarks Statistik (2020) og íslendsk tøl eru frá Liabilities, assets and net worth of individuals by family type, age and residence, Hagstofa Íslands (2020).

[vii] Í myndini av eftirlønaruppsparing og húsarhaldsskuld í % av BTÚ fyri 2020, verða privatu eftirlønaruppsparingarnar samanbornar við teimum hjá OECD londum. Í OECD uppgerðini inngangа allar eftirlønaruppsparingar við fullari upphædd (tað vil siga hædd verður ikki tikið fyri skatting av pensjónum), og harafturat eru føroysku tænastumanna-pensjónurnar ikki taldar við, soleiðis at uppgerðin er samanberilig við tí hjá OECD.